


# Frálandsskip uppgávur í vindorkuvinnuni

**Jan Müller**

08.12.2015 - 12:25

Oljan.fo

Hóast útlitini hjá mongum frálandsreiðaríum eru døpur í løtuni, so eru tó undantøk. Eitt teirra er ESVAGT, sum hevur fingið eitt bein innan í vindorkuvinnuna. Har hevur danska reiðaríið "Esvagt", har ikki so fáir føroyingar arbeiða, gjørt eina 10 ára avtalu við MHI Vestas Offshore Wind um at veita tænastur til 165 MW Nobelwind verkætlanina úr fyri belgisku strondini.  ESVAGT skal byggja eitt nýtt skip, sum skal veita tænastur til tøkningarnar hjá Vestas Offshore Winds.

"Vit hava verið sera nøgdir við arbeiðið, sum skip hjá ESVAGT hava gjørt fyri okkum. Tí var tað náttúrligt fyri okkum at halda fram við samstarvinum. Nýggja skipið skal gera tað lættari og meira fleksibult at stuðla arbeiðinum hjá teimum ymsu fakbólkunum, sum arbeiða við hesum, sigur stjórin í MHI Vestas, Asger Pedersen.

Nobelwind verkætlanin, sum liggur 50 km. út fyri belgisku strondini, krevur saman við enn eini vindorkuætlan, Belwind 1, eitt serútgjørt veitingarskip, eitt sokallað SOV, sum burturav er bygt til endamálið. Tað verður norska Havyard skipasmiðjan, sum skal designa skipið til hesa serstøku verkætlanina.

Skipið verður bygt við drúgvum royndum frá veitingum til vindmylnulundir offshore. Skipið verður bygt á Cemre skipasmiðjuni í Turkalandi og latið eigarunum í 2017.

Kelda: Esvagt